# ítróttur

Nr. 80 • hósdagur • 4. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kyndil og marran



*Einki er at ivast í, at H71 spakuliga hevur ment seg til eitt slag av marru hjá Kyndli. Við verandi formkurvuni í huga, eigur hetta tó at vear dysturin, har Kyndil fær vaskað hetta heitið av sær*

## Enn einaferð kunnu hoyvíkingar leggja fót fyri Kyndli, og sunnudagin skal VÍF royna seg í argandi útidysti

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Hóast kvinnurnar ikki spæla landskappingardyst hetta vikuskiftið, so bendir alt á eitt sera spennandi hondbóltsvikuskiftið.

Teir tríggir dystirnir í mansdeildini eru nevnliga allir av slíkum slag, at tað er sera ilt at meta um, hvør parturin man fara at standa sum vinnari, tá avtornar.

### Marran hjá Kyndli

Lagt verður fyri leygardagin, tá Kyndil fær vitjan av H71. Lítil ivi man vera um, at Kyndil í løtuni líkist best koyrandi hondbóltsliðnum í landinum, og móti einum »kreppuraktum« H71-liði, sum nú hevur tapt tríggjar ferðir á rað, skuldi alt talað fyri einum tryggum sigri til teir grønu.

Men – og tað er eitt menn. Kyndil hevur nevnliga ikki vunnið á H71, síðani teir í grundspælinum í fjør vunnu 33-29 í Hoyvíkarhøllini. Samanlagt gjørdist talan seinasta kappingarár um ein Kyndils-sigur, ein javnleik og ein sigur til hoyvíkingarnar, og hartil vann H71 tá eisini hálvfinalurnar í steypakappingini móti Kyndli. Í ár hevur skorist lítið frægari hjá oddaliðnum. Fyrri dysturin millum liðini í grundspælinum endaði nevnliga við tryggum 31-27 sigri til H71.

Soleiðis er talan spakuliga um at gerast til eitt kompleks fyri teir grønu, og so er spurningurin, um verandi viðrákið - og mótburðurin hjá H71 – er nóg mikið at broyta hetta.

### Kreppurakt Neista-lið

Sunnudagin er so aftur dystur í Ítróttarhøllini á Hálsi, tá VÍF vitjar Neistan. Eins og hjá Kyndli, so átti verandi formkurvan í landskappingini at borgað fyri einum tryggum sigri til VÍF, men teir gulu munnu tó á ongan hátt kenna seg alt ov tryggar.

Í fyrra dystinum millum liðini var bert eitt mál í seinastu sekundunum á muni. Og tá hevði Neistin júst misnýtt stóran møguleika. Munirnir millum tá og nú eru tó fleiri. Fyrst og fremst, so tóktist Neistin tá at vera á veg upp úr aldudalinum, sum liðið síðani er endað so dyggiliga í, eins og VÍF eftir hetta og fram til seinasta vikuskifti tóktist hava fulla ferð framá.

Spurningurin er so, hvørt hetta verður dysturin, har Neistin skal lyfta sær aftur, og um VÍF steðgaði eitt sindur upp, eftir tapið fyri Kyndli. Ella um talan verður eina staðfesting av stigatalvuni, sum sigur sína greiðu søgu um, at VÍF er klárt sterkara liðið av hesum.

### Tvey í viðráki

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið er á Skála, har StÍF tekur ímóti KÍF. Her er talan um tvey lið, sum bæði tykjast hava viðrák í løtuni, og so er spurningurin, hvør teirra skal fáa tapið stigini í hesi uppgerðini.

Fyrra dystin millum liðini vann KÍF við einum máli, og tá var líkt til, at StÍF veruliga var í kreppu. Tann myndin helt sær eisini fram til seinasta vikuskifti, tá StÍF brádliga vann á H71. Og ikki minst gav spælið hjá StÍF í teirri uppgerðini vónir um fleiri stig í komandi dystunum.

KÍF hevur hinvegin eisini havt góðan byrð. Seinasta staðfestingin av hesum var tryggir sigurin á Neistanum, og saman við H71 er KÍF nú á einum hampuliga óvandum bronsuplássi. So er spurningurin, hvørt tann støðan eisini heldur sær til eftir vikuskiftið.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

Atlantic Airways kappingin

| Dagf | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 04.12 | 16.00 | Kyndil-H71 | Kári Hansen & Dánjal Hansen |
| 05.12 | 16.00 | Neistin-VÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 05.12 | 16.00 | StÍF-KÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |

**Coca-Cola kappingin, kvinnur**

VB-Tjaldur
Stjørnan-Neistin II
Neistin I-StÍF
Søljan-VÍF

### Flogbóltur

**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 04.12 | 14.00 | ÍF-KÍF | SÍ |
| 05.12 | 14.00 | Mjølnir-TB | ÍF |
| 05.12 | 14.00 | SÍ-Dráttur | KÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 04.12 | 16.00 | ÍF-Fram | Mjølnir |
| 05.12 | 16.00 | SÍ-Fleyr | Mjølnir |

## Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 8 | 6 - 0 - 2 | 251 | 174 | 77 | 12 |
| 2 VB | 7 | 6 - 0 - 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 3 Stjørnan | 6 | 6 - 0 - 0 | 163 | 123 | 40 | 12 |
| 4 Søljan | 8 | 4 - 0 - 4 | 223 | 198 | 25 | 8 |
| 5 VÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 187 | 186 | 1 | 8 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 150 | 186 | -36 | 3 |
| 7 Kyndil | 7 | 1 - 1 - 5 | 131 | 192 | -61 | 3 |
| 8 Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 135 | 253 | -118 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 8 | 6 - 0 - 2 | 252 | 194 | 58 | 12 |
| 2 VÍF | 8 | 6 - 0 - 2 | 228 | 203 | 25 | 12 |
| 3 H71 | 8 | 4 - 0 - 4 | 241 | 234 | 7 | 8 |
| 4 KÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 206 | 220 | -14 | 8 |
| 5 Neistin | 8 | 2 - 0 - 6 | 211 | 247 | -36 | 4 |
| 6 StÍF | 8 | 2 - 0 - 6 | 215 | 255 | -40 | 4 |